# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 20. mars 2025 til 7. mars 2026

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Hetta árið var starvsnevnd SSF: Rókur í Jákupsstovu, forfólk, Alvi Hjelm, næstforfólk, Bjørg Jensen, skrivari, Sabina Poulsen og Annika Olsen, nevndarlimir, umframt Signhild Rannváardóttir sum forfólk í íðkaranevnd SSF og Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur. Starvsnevndarfundir hava verið umleið eina ferð um mánaðin.

Undirritaða forfólk hevur í sambandi við hendan aðalfund fráboðað, at eg ynski ikki at taka við afturvali; men tíbetur eru øll hini tøk til at halda áfram, um aðalfundurin ynskir tað.

## Svimjinevnd

Avbjóðingar vóru tíverri við at fáa eina virkna svimjinevnd í hesum tíðarskeiði, so at starvsnevndin og serliga Bjørg Jensen yvirtóku uppgávurnar. Svimjinevndin tekur sær av heimligu kappingunum, umframt spurningum ísv kappingarreglur SSF.

## Dómsnevnd

Hetta árið var dómsnevnd SSF: Anni á Hædd, forfólk og Jórun Eið Johannesen og Monika H. Rasmussen, nevndarlimir. Einki mál hevur verið hjá dómsnevnd SSF at viðgera í hesum tíðarskeiði. Hinvegin høvdu vit mál í Ítróttardómstóli ÍSF, har viðgerðin varð so drúgv, at starvsnevnd SSF at enda valdi at sleppa málinum.

## Dómarar

Útbúnu yvirdómarar SSF eru: Dan Hjelm, Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen, Hálvdan Rúni Gaardbo og Rakul N. í Lágabø. Í 2025 kom Rakul í Lágabø afturat sum altjóða yvirdómari, og John D. Olsen sum altjóða startari. Sostatt eru okkara altjóða yvirdómarar nú Dan Hjelm, Katja Lervig, Rúni Gaardbo og Rakul N. í Lágabø, og okkara altjóða startarar Erling Eidesgaard, Eyðun Húsgarð og John D. Olsen.

Altjóða yvirdómararnir og startararnir fingu endurnýggjað sína góðkenning á vetri 2022, so at tey eru góðkend av World Aquatics fram til árslok 2026. Katja Lervig og Rúni Gaardbo luttóku á EM U23 2025, og Rakul í Lágabø og Dan Hjelm á EMS 2025, øll eftir at hava luttikið á kravdum skeiði hjá European Aquatics. Altjóða dómarar hava vaksandi týdning fyri okkum, nú World Aquatics krevur slíkar til stevnu,r har tíðir skulu kunna brúkast til HM og OL.

## Svimjiskúlin

Rúni Gaardbo, Pálin Olsen og Jórun Eið Johannesen eru oddafólk í Svimjiskúla Føroya, umframt at vit hava onnur útbúgvin til at kunna undirvísa í skipanini. Hetta árið hevur lítið virksemi verið.

## Lívbjarging

Svimjisambandið endurnýggjaði á heysti 2022 lívbjargingarskipan okkara, tá ið 10 fólk tóku prógv sum lívbjargingardómarar í skipanini hjá SvømDanmark. Tíverri hevur í so lítið virksemi verið hetta farna árið, út yvir at vit fingu bílagt nýggja útgerð. Nú í apríl verður dagføringarskeið til dómararnar.

## Landsliðsvenjari, -toymi og samskipari

Rúni Gaardbo er settur sum landsliðssamskipari, við ábyrgd fyri úrvalsvirkseminum, umframt landsliðnum í samráð við venjarar og onnur. Virksemið er mest venjarafundir í sambandi við heimligu stevnurnar, og venjingarlegur uppundir altjóða stevnur. Hetta árið vóru tó tvey nýggj og spennandi átøk, nevniliga tá ið vit í september høvdu felags legu og kapping við íslendingum, og tá ið feløgini við stuðli frá Svimjisambandinum millum jól og nýggjár skipaðu fyri felagslegu.

## Stevnutøkningur og stroymitoymi

Hóast Ólavur Hansen fór úr starvsnevnd SSF í 2022, so hevur hann tíbetur hildið áfram sum álítandi tøkningur hjá okkum, tá ið tað kemur til tær skipanir og ta tøkniligu útgerð, sum vit brúka til svimjistevnur, umframt samskiftið við tey KT-fólk sum bjóða seg fram til sjálvar stevnurnar. Afturat hesum hava vit góða nyttu av sokallaða 'stroymitoyminum', sum seinasta árið hevur verið serliga undirritaði og Jákup í Jákupsstovu, til at taka sær av stroyming frá stevnum SSF. SSF hevur tørv á at fáa nýggj fólk í stroymitoymið, til at tryggja at tað virksemið kann halda áfram.

## Skrivstova, bókhald og aðalskrivari

Hetta árið hevur forfólkið tikið sær av skrivstovuni, við hjálp frá serliga skrivaranum, Bjørg Jensen, umframt framtil september 2025 frá aðalskrivaranum Sølva Reinert Hansen. Uppgávurnar eru serliga at fyriskipa okkara meistarastevnur, landsliðsluttøka og tiltøk, umframt í alsamt størri mun at gera umsóknir til stuðulsskipanir, og uppgerðir í teimum førum har játtan fekst. Tvær stórar uppgávur í 2025, vóru NMU 2025 í Havn og felags venjingarlegan við íslendingar.

## Íðkaranevnd

Hetta árið hevur íðkaranevnd SSF verið Barbara Debes, Natanael Matras, Rói Bech og Signhild Rannváardóttir. Signhild er forfólk, Natanael næstforfólk, Barbara skrivari og Rói nevndarlimur.

Íðkaranevndin skipar m.a. fyri árligu gallaveitslu SSF, eina viku aftaná FM á stuttgeil, og skipaði so í ár eisini fyri vali, har Signhild Rannváardóttir varð afturvald, og Bjørg Ólavsdóttir nývald.

## Nýtt svimjifelag

Í januar 2026 fingu vit fyri aðru ferð síðani 2023 eitt nýtt svimjifelag, sum er Svimjifelagið Neptun í Runavík. Tey hava longu rættiliga nógvar limir, og uppliva stóran áhuga eisini frá sponsorum. Vælkomin Neptun!

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, eru nógvar góðar kreftir í svimjingini, sum vit dúva uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, ið vit lukkutíð fáa fyri lítið og lætt.

Serliga er árligi kalendarafundurin ein góð kelda til hjálp og konsensus í sambandi við heimligu stevnurnar, umframt nú rímiliga regluligu forfólkafundirnir, ið vit byrjaðu við í 2022.

Árliga svimjiráðstevnan er ikki komin aftur omaná korona, men hava vit í staðin regluligar forfólkafundir, farna árið í september 2025 og januar 2026. Evnini hava serliga verið um ætlanir og framtíðarútlit SSF, men í september var eisini kunning um Úrval og Tryggan Ítrótt.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Nú í mars 2025 vóru tað 1398 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Ægir, 306 í Havnar Svimjifelag, 192 í Svimjifelagnum FLOT, 130 í Suðuroyar Svimjifelag, 115 í Svimjifelagnum Neptun, 110 í Svimjifelagnum Reysta, 92 í Svimjifelagnum Hellufossur, og 53 í Fuglafjarðar Svimjifelag.

Til samanbering vóru tað í 2024 tilsamans 1376 limir í føroysku svimjifeløgunum, harav 400 í Havnar Svimjifelag, 400 í Ægir, 178 í Svimjifelagnum FLOT, 150 í Suðuroyar Svimjifelag, 109 í Svimjifelagnum Reysta, 86 í Svimjifelagnum Hellufossur og 53 í Fuglafjarðar Svimjifelag.






# Svimjiárið 2024-2025

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta svimjiárið fyri 13 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav trimum meistarastevnum og einari norðurlandameistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. Hetta var 1 AQUA-góðkend stevna meira enn í undanfarna svimjiári.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HS Open | Tórshavn | 28.-29.sep.24 | 25m | 38 | 5 | 86 | 13 | 491 | 655 |
| Ægir Open | Klaksvík | 26.-27.okt.24 | 25m | 39 | 5 | 119 | 45 | 765 | 662 |
| FMS/JMS | Tórshavn | 8.-10.nov.24 | 25m | 86 | 4 | 61 | 46 | 609 | 798 |
| SMS Jólasprint | Tórshavn | 14.dec.24 | 25m | 31 | 6 | 85 | 18 | 351 | 649 |
| SuSvim Open | Vágur | 11.-12.jan.25 | 50m | 38 | 4 | 65 | 10 | 380 | 593 |
| HS Open | Tórshavn | 8.-9.feb.25 | 50m | 39 | 7 | 102 | 36 | 578 | 636 |
| SuSvim Open | Vágur | 22.-23.feb.25 | 50m | 38 | 4 | 75 | 16 | 457 | 664 |
| Lions Open | Klaksvík | 15.-16.mar.25 | 25m | 38 | 7 | 110 | 22 | 720 | 729 |
| HS-stevna B1-4 | Tórshavn | 12.apr.25 | 25m | 17 | 7 | 129 | 10 | 328 | 460 |
| Tórshavn Open | Tórshavn | 24.-26.apr.25 | 50m | 57 | 6 | 66 | 13 | 474 | 700 |
| ABMS | Tórshavn | 10.-11.mai.25 | 25m | 85 | 7 | 171 | 30 | 1260 | 544 |
| FML/JML | Vágur | 7.-9.jun.25 | 50m | 80 | 4 | 53 | 39 | 531 | 734 |
| NMU | Tórshavn | 5.-6.jul.25 | 50m | 32 | 10 | 100 | 12 | 351 | 737 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hetta svimjiárið fyri 7 stuttleikastevnum, fyri okkara yngstu aldursbólkar: HS-stevna á Argjum 21. sep. 24, SuSvim-stevna í Páls Høll 12. okt. 24 (har tey svumu breiddir), FS-stevna í Fuglafirði 7. des. 24, SHF-stevna í Kvívík 18. jan. 25, FLOT-stevna á Toftum 1. feb. 25, SuSvim-stevna í Páls Høll 8. mar. 25 (har tey svumu breiddir), og Reysta-stevna í Leirvík 29. mar. 25. Hetta var ein stuttleikastevna meira enn í undanfarna svimjiári.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF luttóku á 8 uttanlanda og altjóða stevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg luttóku í øllum førum á Køge Open 2024, Reykjavík International 2026 og Danish Open 2025, at Elisabeth Erlendsdóttir og Vár E. Eidesgaard búðu og kappaðust í USA, og at Jonna og Líggjas Joensen búðu og kappaðust í Danmark. Hetta var ein uttanlanda stevna meira hjá SSF enn í undanfarna svimjiári.

Hartil luttóku vit í 2025 fyri fyrstu ferð nakrantíð við einum liði á EM í Open Water, har undanfarna luttøka annars hevur verið Pál Joensen sum einstaklingur í 2014. Meira um tað seinni í hesum.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NM/NJM24 | DEN | 1.-3.des.24 | 25m | 14 | 5 | 68 | 2 | 2 | 2 | 779 |
| HMS 24 | HUN | 10.-15.des.24 | 25m | 3 | 0 | 5 | 0 | 0 | 0 | 769 |
| EM U23 25 | SVK | 26.-28.jun.25 | 50m | 3 | 0 | 12 | 0 | 0 | 0 | 724 |
| EJM 25 | SVK | 1.-6.jul.25 | 50m | 3 | 0 | 13 | 0 | 0 | 0 | 787 |
| SMÍ 25 | ISL | 28.-29.jun.25 | 50m | 8 | 0 | 46 | 5 | 9 | 4 | 624 |
| NMU 25 | FRO | 5.-6.jul.25 | 50m | 14 | 6 | 55 | 0 | 0 | 0 | 587 |
| OyL 25 | GBR | 14.-17.jul.25 | 25m | 12 | 20 | 98 | 7 | 12 | 11 | 783 |
| HM 25 | SGP | 27.jul-3.aug.25 | 50m | 4 | 2 | 10 | 0 | 0 | 0 | 732 |

# Landsliðshópar 2024-2025

## NM/NJM 2024 í Vejle, Danmark

**Svimjarar (14)**: Ari R. Weihe (2005), Áki Eliassen (2006), Bartal E. Eidesgaard (2003), Isak Brisenfeldt (2006) og Silas D. Lindberg (2008) úr HS, Lea O. Højsted (2008), Róa Trygvadóttir (2008), Heini M. Askham (2006) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Alisa Vestergård (2003), Bjarta í Lágabø (2009) og Jón Hofgaard (1992) úr SuSvim), og Jóhanna Ólavsdóttir (2007) og Fróði Hansen (2008) úr FS.
**Venjari**: Rúna Jakobsen og Kristian Martin Joensen
**Ferðaleiðari**: Gunnvá Thomsen

## HMS 2024 í Budapest, Ungarn

**Svimjarar (4)**: Lea O. Højsted (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, og Elisabeth Erlendsdóttir (2005) og Isak Brisenfeldt (2006) úr HS.
**Venjari**: Rúni Gaardbo
**Ferðaleiðari**: Bjørg Ólavsdóttir

## EM U23 2025 í Samorin, Slovakia

**Svimjarar (3)**: Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Bartal Eidesgaard (2003), Isak Brisenfeldt (2006) úr HS

**Venjari**: Johan Martin Thorsteinsson, hartil Jon Hestoy vegna HS

**Ferðaleiðari**: Bjørg Ólavsdóttir

## EJM 2025 í Samorin, Slovakia

**Svimjarar (3)**: Lea O. Højsted (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Silas Dam Lindberg úr HS.

**Venjari**: Malena Hansen

**Ferðaleiðari**: Janus M. Joensen

## SMÍ 2025 í Hafnarfirði, Íslandi

**Svimjarar (8)**: Oddvaldur Leivsson (2008), Ólavur W. Jákupsson (2008) og Óli Mikkelsen (2008) úr HS, Durita Askham (2008), Róa Trygvadóttir (2008) og Bárður Ólavsson (2008) úr Ægir, og Rebekka Róðinsdóttir (2007) og Fróði Hansen (2008) úr FS

**Venjari**: Fríði Dam Lindberg

**Ferðaleiðari**: Heidi Jacobsen

## NMU 2025 í Tórshavn, Føroyum

**Svimjarar (14)**: Lilja Harrysdóttir (2009), Halla Háfoss (2009), Mariella Henriksen (2010), Jóhannis í Stórustovu (2011), Theodor Salter (2011) og Sigbjartur Egholm (2009) úr HS, Bjarta í Lágabø (2009), Jórun Winther (2011), Sissal R. Ellendersen (2010), Emma Debes (2010) og Talita Johannesen (2010) úr SuSvim, Lea Petersen (2009) og Tórir Olsen (2011) úr Ægir, Sirið Vesturtún (2011) úr FS.

**Venjari**: Róland Toftum og Fríði Dam Lindberg

**Ferðaleiðari**: Bjørg Debes

## HM 2025 í Singapore

**Svimjarar (4)**: Lea O. Højsted (2008) og Líggjas Joensen (2008) úr Ægir, Isak Brisenfeldt (2006) úr HS, Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim

**Venjari**: Rúni Gaardbo

**Ferðaleiðari**: Barbara Debes

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar settu 61 føroysk met og 29 føroysk juniormet, hetta svimjiárið 2024-2025, tað vil siga frá 1. september 2024 til 31. august 2025.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 15 føroysk met og 23 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2023-2024.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:34.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | ÆO | 2024-10-26 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | X | 01:42.22 | Lea O. Højsted<br>Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.64 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:50.04 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 100 | Firvald | 25m | M | 00:53.67 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.57 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:02.08 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.83 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 4x50 | Frí | 25m | M | 01:34.25 | Bartal E. Eidesgaard<br>Jóni J. Strøm<br>Áki Eliassen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 4x100 | Frí | 25m | X | 03:45.23 | Jonna Joensen<br>Heini M. Askham<br>Lea Petersen<br>Líggjas Joensen | 2005 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:00.21 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:33.17 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:54.60 | Silas D. Lindberg<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Áki Eliassen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:31.59 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-01 | DEN |
| 4x200 | Frí | 25m | M | 07:22.67 | Bartal E. Eidesgaard<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | NM | 2024-12-01 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.07 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-02 | DEN |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Firvald | 25m | M | 01:59.39 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2024-12-02 | DEN |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:49.95 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | NM | 2024-12-03 | DEN |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:21.75 | Bartal E. Eidesgaard<br>Heini M. Askham<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | NM | 2024-12-03 | DEN |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:25.71 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2025-01-26 | FRO |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.88 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-22 | FRO |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:39.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-23 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:09.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | LO | 2025-03-16 | FRO |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.91 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-05 | DEN |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.48 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-05 | DEN |
| 50 | Bringa | 50m | M | 00:29.16 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | DO | 2025-04-06 | DEN |
| 200 | Firvald | 50m | M | 02:03.85 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | DO | 2025-04-07 | DEN |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.29 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-07 | DEN |
| 100 | Frí | 50m | M | 00:51.89 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | DO | 2025-04-07 | DEN |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:38.74 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-08 | DEN |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:36.32 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-08 | DEN |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.11 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SOT | 2025-04-24 | FRO |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.20 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SOT | 2025-04-25 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:36.51 | Bartal E. Eidesgaard<br>Oddvaldur Leivsson<br>Silas Dam Lindberg<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | SOT | 2025-04-25 | FRO |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:01.88 | Óli Mortensen<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Áki Eliassen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | HS | SOT | 2025-04-26 | FRO |
| 4x100 | Frí | 50m | F | 04:10.70 | Durita M. Askham<br>Jóhanna Ólavsdóttir<br>Róa Trygvadóttir<br>Lea O. Højsted | 2007 | Ægir | FM | 2025-06-09 | FRO |
| 50 | Bringa | 50m | M | 00:29.09 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | EMU | 2025-06-26 | SVK |
| 100 | Frí | 50m | M | 00:51.84 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | EMU | 2025-06-28 | SVK |
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:01.85 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-14 | GBR |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.42 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | OyL | 2025-07-14 | GBR |
| 4x50 | Frí | 25m | F | 01:46.77 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Lea O. Højsted<br>Bjarta í Lágabø<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-14 | GBR |
| 100 | Bringa | 25m | M | 01:00.51 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-14 | GBR |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.22 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | OyL | 2025-07-14 | GBR |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:43.46 | Isak Brisenfeldt<br>Heini M. Askham<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | OyL | 2025-07-14 | GBR |
| 4x50 | Frí | 25m | F | 01:46.71 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Lea O. Højsted<br>Jonna Joensen<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-14 | GBR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:27.93 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 50 | Rygg | 25m | F | 00:28.45 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 4x50 | Blandað | 25m | F | 01:56.76 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Lea O. Højsted<br>Bjarta í Lágabø<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 100 | Rygg | 25m | F | 01:00.26 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:27.83 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.77 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 4x50 | Frí | 25m | M | 01:32.65 | Bartal E. Eidesgaard<br>Heini M. Askham<br>Líggjas Joensen<br>Isak Brisenfeldt | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 50 | Rygg | 25m | F | 00:28.03 | Elisabeth Erlendsdóttir | 2005 | HS | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 4x50 | Blandað | 25m | F | 01:54.49 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Lea O. Højsted<br>Bjarta í Lágabø<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-15 | GBR |
| 4x50 | Blandað | 25m | X | 01:50.96 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Bjarta í Lágabø<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-16 | GBR |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:49.27 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-16 | GBR |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:44.77 | Bartal E. Eidesgaard<br>Jón Hofgaard<br>Isak Brisenfeldt<br>Líggjas Joensen | 1992 | SSF | Oyl | 2025-07-16 | GBR |
| 4x50 | Blandað | 25m | X | 01:47.02 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Isak Brisenfeldt<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-16 | GBR |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.60 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | Oyl | 2025-07-17 | GBR |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:21.06 | Isak Brisenfeldt<br>Heini M. Askham<br>Bartal E. Eidesgaard<br>Líggjas Joensen | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-17 | GBR |
| 4x100 | Blandað | 25m | F | 04:15.25 | Elisabeth Erlendsdóttir<br>Lea O. Højsted<br>Jóhanna Ólavsdóttir<br>Alisa Vestergård | 2003 | SSF | Oyl | 2025-07-17 | GBR |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:02.66 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | KO | 2024-10-13 | POL |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:34.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | ÆO | 2024-10-26 | FRO |
| 100 | Frí | 25m | M | 00:50.43 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.64 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-08 | FRO |
| 100 | Firvald | 25m | M | 00:53.67 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.57 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-09 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 02:00.21 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:33.17 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2024-11-10 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:31.59 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-01 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:10.07 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2024-12-02 | FRO |
| 200 | Firvald | 25m | M | 01:59.39 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2024-12-02 | FRO |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:49.52 | Óli Mikkelsen<br>Silas D. Lindberg<br>Áki Eliassen<br>Jóni J. Strøm | 2006 | HS | HJ | 2024-12-14 | FRO |
| 200 | Firvald | 50m | F | 02:25.71 | Jóhanna Ólavsdóttir | 2007 | FS | RIG | 2025-01-26 | FRO |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.88 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-22 | FRO |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:39.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SO | 2025-02-23 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:09.27 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | LO | 2025-03-16 | FRO |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.91 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-05 | DEN |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.48 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-05 | DEN |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.29 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-07 | DEN |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:38.74 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-08 | DEN |
| 400 | Frí | 50m | M | 03:59.21 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | DO | 2024-04-08 | DEN |
| 200 | Bringa | 50m | F | 02:36.32 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | DO | 2025-04-08 | DEN |
| 50 | Bringa | 50m | F | 00:33.11 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SOT | 2025-04-24 | FRO |
| 100 | Bringa | 50m | F | 01:12.20 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | SOT | 2025-04-25 | FRO |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Frí | 50m | F | 04:10.70 | Durita M. Askham<br>Jóhanna Ólavsdóttir<br>Róa Trygvadóttir<br>Lea O. Højsted | 2007 | Ægir | FM | 2025-06-09 | FRO |
| 200 | Frí | 50m | M | 01:52.17 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | EJM | 2025-07-01 | SVK |
| 1500 | Frí | 50m | M | 15:42.98 | Líggjas Joensen | 2008 | Ægir | EJM | 2025-07-02 | SVK |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.42 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | OyL | 2025-07-14 | GBR |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.22 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | OyL | 2025-07-14 | GBR |

# Open Water

## EM í Open Water 2025 í Stari Grad, Kroatia

**Svimjarar (6)**: Jonna Joensen (2005), Líggjas Joensen (2008) og Bárður Ólavsson (2008) úr Ægir, Sissal R. Ellendersen (2010) úr SuSvim, Rebekka Róðinsdóttir (2007) úr FS, Silas D. Lindberg úr HS.
**Venjari**: Rókur í Jákupsstovu
**Ferðaleiðari**: Annika Olsen

Hendan luttøka var nýggj og serstøk, vegna stuðul og tileggjan frá ÍSF og Úrvali, við máli at fyrst og fremst fáa gott úrslit við einum liði í 4x1500 frí, men hartil loyva hesum ungu at royna seg eisini í einstaklingakapping á stytru teinunum.

Royndin eydnaðist sera væl, við tað at øll royndu seg á minst einum teini, og luttóku í øllum tí, sum tey vóru tilmeldað í, uttan at nakar gavst ella varð kolldømdur, og øll so innanfyri tær tíðir sum kravdust til at fáa góðkent úrslit. Øll endaðu í topp-32 á EM, og liðsvimjingin hartil í topp-16.

# Gongdin 2016-2025

## Stevnur fyriskipaðar í Føroyum




## Met sett av føroyskum svimjarum



# Svimjiárið 2025-2026

## AQUA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF hava til nú, hetta svimjiárið, skipað fyri tilsamans 8 AQUA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav einum meistarastevnu, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung og vaksin. Hetta er ein AQUA-góðkend stevna fleiri til nú enn í fjør.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| FRO-ISL | Tórshavn | 6.sep.25 | 25m | 27 | 2 | 44 | 12 | 152 | 577 |
| HS-stevna | Tórshavn | 20.sep.25 | 25m | 24 | 7 | 124 | 10 | 381 | 467 |
| HS Open | Tórshavn | 3.-4.okt.25 | 25m | 42 | 8 | 108 | 15 | 559 | 652 |
| Ægir Open | Klaksvík | 25.-26.okt.25 | 25m | 54 | 7 | 106 | 0 | 655 | 707 |
| FMS/JMS | Klaksvík | 7.-9.nov.25 | 25m | 86 | 5 | 55 | 46 | 552 | 741 |
| HS Jól | Tórshavn | 12.-13.des.25 | 25m | 35 | 5 | 112 | 3 | 630 | 697 |
| SuSvim Open | Vágur | 10.jan.25 | 50m | 30 | 4 | 67 | 0 | 368 | 651 |
| HS Open | Tórshavn | 13.-14.feb.25 | 50m | 36 | 7 | 91 | 11 | 495 | 698 |
| SuSvim Open | Vágur | 28.feb.-1.mar.25 | 50m | 36 | 4 | 69 | 10 | 384 | 649 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg hava hartil til nú skipað fyri 3 stuttleikastevnum, hetta svimjiárið, fyri okkara yngstu aldursbólkar: SHF-stevna í Kvívík 1. nov. 25, FLOT-stevna 31. jan. 25, SuSvim-stevna í Páls Høll 21. feb. 25 (har tey svumu breiddir). Hetta eru tríggjar stevnur færri til nú enn í fjør.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Landslið SSF hava til nú luttikið á 2 uttanlanda og altjóða svimjistevnum, hetta svimjiárið, umframt at feløg hava luttikið í øllum førum á Køge Open 2025 og Reykjavík International 2026, og at Líggjas Joensen og Isak Brisenfeldt búgva og kappast í Danmark. Hartil var landsdystur í Havn í september.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | AQUA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| NM/NJM 25 | ISL | 28.-30.nov.25 | 25m | 10 | 3 | 59 | 1 | 1 | 1 | 757 |
| EMS 25 | POL | 2.-7.des.25 | 25m | 4 | 0 | 9 | 0 | 0 | 0 | 715 |

# Landsliðshópar 2025-2026

## Landsdystur FRO-ISL 2025 í Tórshavn, Føroyum

**Svimjarar (22)**: Lilja L. Harrysdóttir (2009), Halla Háfoss (2009), Mariella A. Henriksen (2010), Lilja Sørensen (2011), India L. Bech (2011), Theodor Salter (2011), Sigbjartur Egholm (2009), Jónatan Samuelsen (2010), Jens Martin Dam (2009), Teitur Miné Róason (2011), Nóa R. Stakksund (2011), Símun Eliassen (2011) og Bragi Bjarnason (2012) úr HS, Sirið Vesturtún (2011), Rakul J. Højbro (2011) og Friálvur Eliassen (2011) úr FS, Jórun Winther (2011), Lea í Trøðini (2011) og Haraldur Mortensen (2010) úr SuSvim, Tórir Olsen (2011) og Benjamin Havn (2011) úr Ægir, Jonni B. Danielsen (2011) úr FLOT.

**Venjari**: Rúni Gaardbo, Bjørg Ólavsdóttir og Fríði Dam Lindberg

**Ferðaleiðarar**: Heri og Petry Mortensen

## NM/NJM 2025 í Reykjavík, Íslandi

**Svimjarar (14)**: Lea Osberg Højsted (2008), Fróði Hansen (2008), Heini M. Askham (2006), Líggjas Joensen (2008) og Bárður Ólavsson úr Ægir, Isak Brisenfeldt (2006) og Silas D. Lindberg (2008) úr HS, Bjarta í Lágabø (2009) úr SuSvim, hartil Oddvá S. Nattested (2006) og Andrias Mellemgaard (2009) vegna Parasport Føroyar

**Venjari**: Rúni Gaardbo og Barbara Debes

**Ferðaleiðari**: Sabina Poulsen, hartil Katrin Dagbjartsdóttir vegna Parasport Føroyar

## EMS 2025 í Lublin, Póllandi

**Svimjarar (3)**: Lea Osberg Højsted (2008) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005) og Bartal E. Eidesgaard úr HS

**Venjari**: Jon Hestoy

**Ferðaleiðari**: Sabina Poulsen

Líggjas Joensen (2008) úr Ægir var eisini úttikin og við á ferðini, men varð sjúkur og kappaðist tí ikki.

# Føroysk met og juniormet

Føroyskir svimjarar hava til nú sett 8 føroysk met og 6 føroysk juniormet hetta svimjiárið 2025-2026, tað vil siga frá 1. september 2025 til 31. august 2026. Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 61 føroysk met og 29 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2024-2025.

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 200 | Blandað | 25m | M | 02:01.23 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | FM | 2025-11-07 | FRO |
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.11 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-07 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:08.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-08 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:30.98 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-09 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:30.72 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2025-11-28 | ISL |
| 200 | Firvald | 25m | M | 01:59.01 | Isak Brisenfeldt | 2006 | HS | NM | 2025-11-29 | ISL |
| 50 | Firvald | 25m | M | 00:24.63 | Isak Brisenfeldt | 2005 | HS | HJ | 2025-12-12 | FRO |
| 50 | Frí | 25m | M | 00:22.55 | Bartal E. Eidesgaard | 2003 | HS | HJ | 2025-12-13 | FRO |

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 50 | Bringa | 25m | F | 00:32.11 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-07 | FRO |
| 100 | Bringa | 25m | F | 01:08.89 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-08 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:30.98 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | FM | 2025-11-09 | FRO |
| 200 | Bringa | 25m | F | 02:30.72 | Lea O. Højsted | 2008 | Ægir | NM | 2025-11-28 | ISL |
| 4x100 | Blandað | 25m | M | 03:56.32 | Silas Dam Lindberg<br>Fróði Hansen<br>Bárður Ólavsson<br>Líggjas Joensen | 2008 | SSF | NM | 2025-11-29 | ISL |
| 4x100 | Frí | 25m | M | 03:32.19 | Líggjas Joensen<br>Silas Dam Lindberg<br>Bárður Ólavsson<br>Fróði Hansen | 2008 | SSF | NM | 2025-11-30 | ISL |

# Gongdin við FM

Meistarastevnur SSF hava hesi seinastu 10 árini verið fyri munandi broytingum, tá ið tað kemur til serliga dagseting og ískoyti av øðrum stevnum, umframt nú í seinastuni, um KVF vildi senda.

Upprunaliga høvdu vit tríggjar meistarastevnur í vanliga svimjiárinum, men vóru vit í 2022 uppi at venda á 7 meistarastevnum, harav ein norðurlendsk. Í 2025 vóru tað 4: ABMS, FML/JML, NMU og FMS/JMS.




'Flaggskipið' var upprunaliga Føroyameistarastevnan (FM), sum í 2016 fekk afturat sær FM á langgeil, og sum síðani varð flutt til at vera í november, enntá við tveimum FM í 2017.

Vegna avmarkingina til bara føroyskar íkarar á FM, royndu vit okkum frá 2019 til 2023 við Atlantic Open, til at royna at fáa eisini útlendingar at kappast í Føroyum.

Masters-stevnan FOMM varð strikað aftaná 2018, tí at trupult var at finna nakran at skipa fyri henni. Og so hava vit gjørt onkrar royndir afturat, t.d. við FM fyri lið í 2022, og ABMS Sprint í 2022 og 2023.

Og so var sjálvsagt korona eisini, ið ávirkaði 2020 og 2021.

Í 2024 tóku vit burtur aftur ABMS-sprint, tí at kalendarin var ríkiliga fullur, umframt at Atlantic Open mátti avlýsast vegna trot á fólk at avgreiða stevnuna.

Nú í 2025, skipaði HS fyri Swim Open Tórshavn, sum eftir ætlan skuldi verða ein afturvendandi stevna á altjóða støði. Hendan ætlanin er tíverri slept aftur, nú til í 2026.

Luttøkan sær tíverri út til at vera minkandi, her á Føroyameistarastevnuni á stuttgeil:




Topp-støðið sær hinvegin út til at hava lagt seg um 750 AQUA-stig, um hugt verður at bestu avrikum:




Spurningurin er so sjálvsagt, um 'stabilt' er nóg gott, tá ið endamálið er at mennast.

# Gongdin við landsliðnum

Tá ið SSF í 2021 skifti til at vilja royna seg við føstum landsliðsvenjara aftur, var tað tí, at vit høvdu afturvendandi avbjóðingar við skipanini, har allir venjararnir vóru á skift úr feløgunum.

Støðugu útskiftingarnar førdu í heilum til miskiljingar í sambandi við landsliðsferð, og var tað hartil trupult at fáa í lag annað landsliðsvirksemi, so sum serliga landsliðslegur.

Hartil høvdu úrslitini í eina tíð verið einki at reypa av, tá ið man hugsar um, hvussu væl úttiknu svimjararnir svumu á landsliðsferð, í mun til støði teirra annars.

Starvsnevndin samtykti tí í 2021 at seta ein landsliðsvenjara, og síðani í leypi av 2023 tvey afturat, so at vit nú høvdu eitt toymi til at standa fyri landsliðsferðum og -legum.

Vit sóu longu við éinum landsliðsvenjara ein bata, men uppstóðu ynski um at skifta burtur frá hesi loysn, til frá ársbyrjan 2025 heldur at hava ein landsliðssamskipara og so venjarar úr feløgunum.

Myndin her vísir, hvussu nógvir svimjarar sum hava betrað seg á landsliðsferð, umframt hvussu nógv av øllum úrslitunum tilsamans vóru betri á landsliðsferð, síðani 2018:




Fyrivarni verður tikið fyri møguligum feilteljingum í hesum, av tí at tað er manuelt arbeiði.

# Annað virksemi 2025-2026

## Umboðan á fundum í Føroyum og uttanlanda

SSF luttekur so vítt gjørligt altíð á teimum pallum, har vit væntast at luttaka, so sum hjá ÍSF, í norðurlendska svimjisambandinum NSF, í norðurlendska lívbjargingarbólkinum NLSG, í evropeiska svimjisambandinum EA, í altjóða svimjisambandinum World Aquatics (AQUA), umframt nú eisini í evropeiska lívbjargingarsambandinum ILSE og altjóða lívbjargingarsambandinum ILS.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum hesi:

- 9. apríl 2025: Fundur við ÍSF um fráboðanarskipan og Tryggan Ítrótt
- 10. apríl 2025: Várumboðsting ÍSF
- 30. apríl 2025: Fundur við Sundsamband Íslands um felagstiltakið FRO-ISL
- 1. mai 2025: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027 (vit fingu referat)
- 5. mai 2025: Fundur við Setrið um lívbjargingarskipanina
- 20. mai 2025: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2025
- 24. mai 2025: ÍSF-aðalfundur í Tórshavn
- 18. juni 2025: STI-tiltak í Brússel
- 28. juli 2025: EA-fundur við evropeisku limalondini í Singapore
- 28. juli 2025: AQUA-fundur við evropeisku limalondini í Singapore
- 29. juli 2025: World Aquatics (AQUA) aðalfund í Singapore
- 30. juli 2025: AQUA Development fundur í Singapore
- 10. sep. 2025: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027
- 26. sep. 2025: EA-evnisdagur um DEI og integritet í Tbilisi
- 26. sep. 2025: NSF-ársfundur í Tbilisi
- 27. sep. 2025: European Aquatics (EA) aðalfundur í Tbilisi
- 21. okt. 2025: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027
- 4. nov. 2025: ÍSF-samstarvsfundur
- 20. nov. 2025: Heystumboðsting ÍSF
- 7. jan. 2026: ÍSF-fundur um Oyggjaleikir 2027
- 7. - 8. jan. 2026: NSF-aðalskrivarafundur í Tallinn
- 12. jan. 2026: Parasport-átakið “Øll við” í Havn
- 12. jan. 2026: Fundur við Úrval um stuðulin til í 2026

# Onnur SSF-tiltøk

SSF roynir eftir førimuni at skipa fyri stimbrandi tiltøkum í Føroyum og fyri føroyingar, afturat sjálvum svimjistevnunum, til at betra um samstarv og førleikar hjá okkum innan svimjingini, og til at vaksa um áhugan fyri svimjing sum heild.

Í tíðarskeiðnum síðani seinasta aðalfund, vóru tiltøkini í øllum førum:

- 9. apríl 2025: Fundur við ÍSF um fráboðanarskipan o.a.
- 15. apríl 2025: Forfólkafundur um dómarabýti o.a.
- 16. juni 2025: Fundur við HS um venjaraúttøku
- 24. mai 2025: Landsliðslega í Havn
- 5. - 7. sep. 205: FRO-ISL venjingarlega og landsdystur í Havn
- 20. sep. 2025: Forfólkafundur í Tórshavn
- 26. okt. 2025: Venjarafundur í Klaksvík
- 27. - 29. des. 2025: Felags venjingarlega í Havn (feløg skipaðu fyri)
- 25. jan. 2026: Forfólkafundur í Havn

# Stutt um okkara limaskapir

## ÍSF

ÍSF skipar tvær ferðir um árið fyri umboðstingi, har forfólk í sersambondunum møtast til at viðgera ymisk viðurskifti, ímillum árligu aðalfundir. Í heyst var viðgerðin um komandi býti av stuðli umvegis ÍSF, um nýtt ÍSF-hús, um hvussu vit skulu telja limir, og um átakið Tryggur Ítróttur.

## NSF

Hetta seinasta árið hevur verið rættiliga friðarligt í norðurlendska svimjisambandinum, undantikið at vit viðgera avgerðini hjá World Aquatics at bjóða Russlandi við aftur til sínar stevnur, og at nú áleggja eisini European Aquatics og okkum at gera hetta sama. Huglagið og samstarvið er gott í NSF, við góðum og konstruktivum fundum.

## LEN/European Aquatics

Undirritaða SSF-forfólk er síðani februar 2022 bureaulimur í LEN/European Aquatics, við ábyrgd fyri serliga miðlan og svimjiførleika. Hetta eru spennandi uppgávur, har vit millum annað hava umskipað miðladeildina og skift út heimasíðu, og ísv svimjiførleika hava tilevnað ein evropeiskan standard fyri vatntryggleika og svimjiførleika, sum nú verður rullaður út í Evropa.

Hetta árið var millum annað skeið í Íslandi fyri íslendingum og føroyingum, um hendan nýggja standard. 8 fólk luttóku úr Føroyum: 3 vegna FLOT, 2 vegna Hellufoss, 1 vegna Ægir og 2 vegna SSF.

## World Aquatics

Viðvíkjandi altjóða svimjisambandinum World Aquatics, er støðan eitt sindur aftur og fram, at tey uppá ta einu síðuna hava góðar stuðulsskipanir, fíggjarliga og til at fáa ráðgeving og hjálp, men á hina taka avgerðir sum opinbart serliga vit norðurlond eru ónøgd við.

Vit norðurlond royna, tað vit kunnu at vísa á, hvussu vit halda, at serliga mannagongdin átti at verið, men fáa svar sum mestsum siga, at her hava tey tikið sína avgerð. Tað kennist í so knortlut, serliga tá ið sami felagsskapur er raskur at flyta okkum fram á veg, viðvíkjandi 'good governance'.

## ILS/ILSE/NLSG

Vit hoyra ikki nógv frá altjóða lívbjargingarsambandinum, út yvir at vit í 2024 fingu svar uppá leysan fyrispurning um møguliga umsókn um fullan limaskap, at tað ikki ber til vegna ásetingar í lóg ILS.

Í Norðurlendska bólkinum var netfundur í februar 2024 og síðani fysiskur fundur í september 2024, men síðani hevur einki verið, út yvir samskifti um ætlaðan ársfund aftur í ár.

# Onnur tiltøk

## Úrval

Á aðalfundi ÍSF í 2024 varð samtykt at skifta til eina nýggja úrvalsskipan, ið ikki er líka vælegnað til okkum, og sum vit tí atkvøddu ímóti. Nýggja skipanin kravdi úrvals- og landsliðsætlan, har vit m.a. skiftu til at leggja meira í liðsvimjing, tí at tað er trupult at røkka somu krøv til einstaklinaavrik.

Til í 2025 fingu vit 276.000 kr í játtan til úrvalsvirksemi, umframt í november 2025 aðrar 25.959 kr at brúka uppá úrvalstænastur í 2025. Til í 2026 fingu vit í fyrstu atløgu 220.000 kr í játtan til úrvalsvirksemi, men fingu aftaná kæru og fund vaksið hetta aftur til 276.000 kr.

Avbjóðingin hjá Úrvali er, at tey í 2024 bundu seg til útgjøld í 2025 og 2026, sum gera, at har mestsum einki var til nýggjar ella hægri umsóknir í ár. Av onkrari orsøk vóru vit hartil eitt av trimum sambondum, sum skuldu ganga aftur í 2026, meðan fýra onnur skuldu fáa tað sama ella meira.

## AQUASP

SSF hevur síðani 2018 fingið fíggjarligan stuðul frá altjóða svimjisambandinum World Aquatics, til menning av okkum ítróttarliga. Fyrstu árini royndu vit at byggja upp eina testprotokoll, áðrenn vit frá umleið 2021 skiftu til heldur at søkja um stuðul til tryggari verkætlanir, so sum útreiðslur til stevnuskipanir, og luttøka á Bergen Swim Festival og Danish Open.

Til í 2023 kravdi World Aquatics nú afturat, at vit millum annað skulu brúka pengar uppá 'good governance', og yvirhøvur til nýggj, mennandi tiltøk, til gagns fyri serliga íðkararnar.

Til í 2025 søktu vit um stuðul til hesi tiltøk, og fingu játtan frá World Aquatics:

1) Ískoyti til okkara stroymingsloysn (nýggja káplar o.a.)
2) Gjøgnumskygnisátakið Sport Transparency Index, umvegis European Aquatics
3) Ferðastuðul til íðkarar, venjarar og dómarar*

Stuðulin frá AQUA var USD 25.000 í 2024, har hann til 2023 var USD 30.000. Orsøkin til minkingina var, at vit í 2024 fingu USD 5000 í bonus fyri at røkka hægri stig í teirra árligu 'good governance'

kanning. Til í 2025 fingu vit so aftur flutt okkum upp á USD 30.000, til 19 av 20 møguligum stigum, og til í 2026 so aftur USD 30.000, fyri nú at hava rokkið 19½ av 20 møguligum stigum.

Tað eina hálva stigið sum vit nú manglaðu til at fáa fult stigatal, var ein nýggjur spurningur, um vit høvdu eina úttøkuskipan til útveljing av altjóða dómarum. Tað hava vit ikki, og tí varð tað 0 stig har.

*"Does your Organisation establish transparent, merit-based, and publicly available procedures for the selection of Technical Officials representing the country at international events or entering the World Aquatics International Technical Officials Pathway?"*

## AQUA Mentorship verkætlan

Aqua Mentorship verkætlanin er sum so liðug, men eru avleiðingar m.a. at forfólk SSF hevur luttikið sum mentor á fundi fyri onnur lond, og at vit eiga at endurnýggja okkara strategi. Strategiin frá 2022 gekk út tað árið, men løgdu vit okkum so á strategiina hjá ÍSF, sum væl at merkja gongur út í ár.

## World Drowning Prevention Day

Altjóða lívbjargingarsambandið ILS heitir regluliga á okkum limalond, at seta sjóneykuna á World Drowning Prevention Day, sum ST í 2021 samtykti at skula vera árliga hin 25. juli. Í 2022 gjørdu vit nógv burturúr, men er tíðspunktið óheppið fyri okkum, vegna uttanlanda stevnur og Ólavsøku.

## Útbúgving

Viðvíkjandi útbúgving, so hevur ein afturvendandi trupulleiki tíverri verið, at vit ábyrgdarar gjarna vilja hava skeið á skrá, fyri so at síggja lítla undirtøku til sjálvi skeiðini. Hetta var t.d. beinleiðis atvold til at World Aquatics ikki lutaði okkum skeið í 2023 og 2024, vegna avlýst skeið í 2021 og 2022

Eitt væleydnað dómaraskeið var í mars 2022 og eitt líka væleydnað lívbjargingardómaraskeið í september 2022. Rakul í Lágabø tók yvirdómaraútbúgving á sumri í 2023, og Nordic L2C Conference var væl eitt slag av útbúgving eisini; men annars hava tað bara verið smærri tiltøk fyri ávís feløg.

Tað er tó eingin ivi um, at skeið eiga at vera, serliga nú Oyggjaleikir verða í Føroyum í 2027. Verandi lívbjargingardómarar skulu dagførast við skeiði nú í apríl, og er ítøkilig ætlan um endurtøku av dómaraskeiðnum frá 2022, nú allarhelst við stuðli frá ÍSF/Oyggjaleikum 2027.

## Tøkni

SSF mennir regluliga um sínar tøkniligu skipanir, til at lætta um hjá okkum í felagsskapinum, væl vitandi at tað serliga er arbeiðskraftin, sum er fløskuhálsur. T.d. er stevnuskipanin Tempus nú álitið,

sum vit fingu í 2021, og verður limaskipanin Holdsport vónandi eisini væleydnað. Í 2025 var talan mest um viðlíkahald, men er ætlanin til 2026 m.a. at fáa ein meira stabilan mixarapult, av tí at verandi telduloysn hevur tað við at krasja eina ferð pr stevnupart.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðinum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## GDPR

Í 2021 kom nýggja løgtingslógin um vernd av persónupplýsingum í gildi, sum vit ítróttarsambond og -feløg eisini mugu fyrihalda okkum til. Virksemið hjá okkum er her serliga, at vera ansin og royna at minka um viðgerð av persónsdáta, umframt at goyma sovorðið forsvarliga.

## Breidd

SSF hevði á pappírinum einki beinleiðis breiddartiltak í 2025, útyvir at vit stuðlaðu feløgum fíggjarliga til luttøku á svimjiførleikaskeiðnum í Íslandi. Hinvegin tykiskt stórur vøkstur at vera í luttøkuni á barnastevnum runt landið, og eisini virksemi í feløgum sum t.d. væleydnaða rørsluvikan hjá Hellufossi í Kvívík.

## Svimjiførleiki

Her var nevnda norðurlendska svimjifrálæruráðstevnan okkara størsta átak í 2024, tíverri við ov lítlari luttøku frá øðrum enn okkum og okkara feløgum, men tó sera góð sambært eftirmetingum frá luttakarunum. Nú royna vit við European Aquatics at fáa í lag nýggja svimjiskúlaskipan.

## Svimjihallir

Í heysti í 2024 hendi tað endiliga , at nýggja svimjihøllin í Havn lat upp. Tað var eitt stórsligið tiltak, og prógvaði høllin seg longu á FM á stuttgeil í november, har heilt nógv met vórðu sett.

Og í desember 2025 varð Bylgjan í Runavík innvígd, har høvuðshylurin er 25m langur og 20m breiður, so at kappast kann á 8 geilum. Áhugavert verður at síggja, hvussu tað økið mennist, nú tey hava sína egnu høll.

## Skrivstova hjá ÍSF

Sum avleiðing av byrjanini uppá langhylin í Havn, var ÍSF-húsið tikið niður á heysti í 2020, ið so aftur viðførdi, at SSF vegna goymslutørv flutti til góðar umstøður hjá Runavíkar kommunu í  Saltangará. Hesin bygningur varð tó seldur, so at vit á heysti 2025 máttu flyta út, og nú húsast partvís hjá ÍSF í Havn, og partvís í privathúsum hjá okkum limum og tiltakslimum í starvsnevnd SSF.

## Safeguarding

Vegna nýggj krøv um serliga barnaváttanir, og krøv og ynski til yvirhøvur at betra um trygd og trivnað, so royna vit alsamt at betra um hesi viðurskifti. Allir venjarar og leiðarar, sum luttaka á landsliðsferðum, hava nú barnaváttan, óansæð aldur á teimum á ferð; og vit royna sum heild at styrkja um tær avtalur, vit hava við hesi sum taka ábyrgd vegna SSF á uppgávum okkara.

Eitt átroðkandi ísv 'good governance' meting okkara hjá World Aquatics, umframt sjálvsagt yvirhøvur, er at fáa eina fráboðanarskipan í lag, so at fólk kunnu fráboða eitthvørt óheppið. Samskifti er við serliga World Aquatics og ÍSF, og sær tað tíbetur út til, at ÍSF hevur ella fær eina skipan í lag, við átakinum Tryggur Ítróttur.

## 'Good governance'

Afturat nevndu átøk til at betra um okkara fyrisiting, er gott samskifti við serliga ÍSF og World og European Aquatics um, hvar vit eiga at liggja ísv. hetta 'good governance'. Øll ynskja sjálvsagt hægst møguliga støði, men má tað avvigast í mun til avmarkaðu arbeiðsorku okkara, serliga tá ið tað kemur til møgulig nýggj átøk. Vit royna sjálvsagt at gera tað, sum vit gera so rætt sum gjørligt, og víðka so í stigum, til dømis vónandi við fráboðanarskipan og gjøgnumskygnisátaki í 2025.

## Stuðlar

Høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya er Atlantic Airways, sum hevur verið hollur stuðul í nú mong ár. Hartil hava vit haft trúgvar stuðlar serliga í sambandi við okkara meistarastevnur, umframt at hava fingið góðan stuðul frá teimum kommunum og felagsskapum, sum vit hoyra til, frá Løgtinginum og Veddingini umvegis ÍSF, frá Úrvali og frá teimum stuðulsskipanum sum finnast serliga umvegis ÍSF.

Hinvegin hevur ein stórur smeitur verið, at Kringvarp Føroya hevur valt FM í svimjing frá í sínum raðfestingum, sum so aftur hevur kostað okkum nógv í lýsingarinntøkum. Hetta er raðfesting sum vit ætla okkum at spyrja inn til, nú nýggjur kringvarpsstjóri er settur.

# Niðurløga

Hetta var so mítt tólvta ár sum formaður SSF, ella 11½ um vit taka við, at vit í 2018 fluttu aðalfundin frá at vera um heystið, til í staðin at vera aftur um várið í 2019.

Og sum samtykt á SSF aðalfundinum í 2022, so merkir hetta, at eg eigi at fara frá, vegna markið á í mesta lagi 6 ferðir 2 ár sum forfólk. Gott nokk við byrjan frá 2022, men friður verið við tí.

Eg vil takka tykkum mongu sum hava stuðlað okkum og føroysku svimjingini hesi mongu árini, við serligari heilsan til tykkum sum hava sett tykkara dýrabæru tíð av eisini.

Føroysk svimjing hevur tað sum so gott, vegna okkara mongu evnaríku íðkarar, og fólk afturat teimum. Men, avbjóðingin er sum so ofta sagt, serliga at finna arbeiðskraft til hetta ymiska.

Tað er arbeiðsorka, fólk og fígging sum, eftir mínum tykki, eru størstu avmarkingar fyri, hvussu nógv føroysk svimjing kann mennast, nú og í nærmastu framtíð. Vónandi finnast loysnir til hetta.

Hyljarnar hava vit hinvegin tíbetur, í fleiri og fleiri økjum. Men gloymið nú ikki hini, sum hava so mikið nógva frástøðu til ein svimjihyl, at tey ongantíð koma uppí hesa góðu familju.

Góða eydnu, tit sum nú halda áfram ella taka við. Hetta næsta árið verður rættiliga avbjóðandi, nú Oyggjaleikir eru á skrá á sumri 2027, og alt tað vanliga áðrenn tað.

Men tit skulu nokk klára tað, sjálvi og saman við restini av okkum sum leggja í føroyska svimjing.

Við svimjikvøðu

Toftir 5. mars 2026

Rókur í Jákupsstovu